

*Fyrrverandi djúpvatnstrolarin, Snoddið, sum í sínari tíð var heimahoyrandi á Toftum, er nú aftur ein partur av føroyska fiskiskipaflotanum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Rasmus Effersøe landað á Tvøroyri

**Væl av virksemi var á bryggjuni á Tvøroyri seinasta fríggjadag, tá ið Sosialurin var framvið**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fríggjadagin, tá ið vit spákaðu ein túr eftir bryggjuni á Tvøroyri, hevði djúpvatnstrolarin, Rasmus Effersøe, júst lagt 1200 kassar av blandaðum fiskasløgum upp á Tvøroyri.

Fitt av virksemi var at síggja á bryggjuni hendan dagin.

Menn stákaðust í einum trailara beint omanfyri gyrðingina, onkur truckur koyrdi aftur og fram, ein stórur krani hekk omanyvir Rasmussi Effersøe, og menn stíddust við at fáa tómu fiskakassarnar umborð aftur.

Longur inni á bryggjuni fluttu nakrir mans garnabátin, Anitu, tí Rankin, sum ikki longur er gulur, men nú er reyður, skuldi sleppa framat at taka ís til nýggjan túr.

Fyri eini tíð síðan skifti reiðaríið hjá Gudmundi Mortensen gamla Rasmus Effersøe út við nýggjari skip – og núverandi Rasmus Effersøe er gamli Snoddið, sum Jógvan I. Olsen og aðrir á Toftum áttu í nøkur ár.

Skipið hevur verið burtur av landi í fleiri ár og er nú aftur ein partur av føroyska fiskiskipaflotanum.

Barnaverndarstova Føroya:

# Skipar fyri skeiði fyri øllum barnaverndarlimum

**Fyrsta kunnandi tiltakið hjá Barnaverndarstovu Føroya verður komandi leygardag. - Vit bjóða øllum barnaverndarlimum í landinum á skeið á Hotel Føroyum. Á skeiðnum verður kunning um barnaverndarlógina, sigur Anna Dam, leiðari**

BARNAVERND

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var tann 9. juni í ár, at Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya skrivaðu undir samstarvsavtalu, har avgjørt varð at seta á stovn felagskommunala barnaverndarstovu.

- Kommunufeløgini halda tað vera umráðandi, at Barnaverndarstova Føroya fer at virka longu í ár, soleiðis at kommunalu barnaverndartænasturnar eru til reiðar, tá nýggja barnaverndarlógin, sum leggur barnaverndarøkið til kommunurnar at umsita, kemur í gildi 1. januar 2006.

Leiðarin á Barnaverndarstovu Føroya, Anna Dam, vísir á, at í nýggju barnaverndarlógini er krav um, at kommunurnar skulu seta á stovn sosialar umsitingar at umsita barnaverndarmál. Hesar skulu gera tilmæli til barnaverndirnar at taka avgerð eftir, tá barnaverndarmál taka seg upp. Vónandi fer hetta at hava við sær, at málsviðgerðin verður eins kring landið, og at vitanarstøðið sum heild innan økið hækkar.

- Uppgávan hjá Barnaverndarstovu Føroya er at vegleiða og ráðgeva kommunalu barnaverndartænastunum. Eisini er ein týdningarmikil uppgáva at skipa fyri undirvísing viðvíkjandi uppgávunum hjá barnaverndartænastunum sambært nýggju barnaverndarlógini.

Fyrsta kunnandi tiltakið hjá barnaverndarstovuni verður nú leygardagin, og er fyri allar barnaverndarlimir í landinum.

- Vit bjóða øllum barnaverndarlimum í Føroyum á skeið á Hotel Føroyum. Á skeiðnum verður kunning um barnaverndarlógina. Dentur verður lagdur á at geva eina greiða fatan av málsviðgerðarkrøvunum í lógini, og hvørjar fyriskipanir kunnu setast í verk sambært hesari, tá tørvur er á tí til tess at tryggja endamálið við nýggju lógini.

Endamálið við lógini er nevniliga, "at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa ein tryggan uppvøkstur".

Barnaverndarstovan hevur heitt á løgfrøðingarnar, Beintu Festirstein og Biritu Ludvíksdóttir Poulsen, um at standa fyri hesum fyrsta skeiðnum.

Verður undirtøkan stór, verður sama skeið eisini hildið fríggjadagin, 4. november.

- Ætlanin er at skipa fyri fleiri skeiðum í november og desember, soleiðis at barnaverndartænasturnar eru tilreiðar at taka við avbjóðingunum í nýggju lógini á nýggjárinum, sigur Anna Dam, leiðari.

# Sjúkrasystrar eru fyri kynsligum ágangi

**Ein donsk kanning vísir, at áttanda hvør sjúkrasystir er fyri óynsktum kynsligum ágangi í sínum arbeiði**

KYNSLIGUR ÁGANGUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Flirt, "sjoflar" viðmerkingar, ónærisligar søgur og óneyðug nerting eru partur av tí, sum sjúkrasystrar í Danmark eru úti fyri í sínum starvi.

Í eini nýggjari kanning, sum danska blaðið, Sygeplejersken, hevur gjørt, svara 13% av teimum spurdu sjúkrasystrunum "ja" til, at tær eina ella fleiri ferðir hava verið úti fyri óynsktum seksuellum ágangi - ella "schikanu", sum hevur verið útyvir tey mørk, tær seta.

18% av sjúkrasystrunum siga, at tær vita um, at teirra starvsfelagar hava kent seg seksuelt ágingnar á arbeiðsplássinum.

2200 spurnarbløð vórðu send út til sjúkrasystrar um alt landið. 988 (45%)av teimum 2200 svaraðu spurningunum. Bert ein triðingur av teimum, sum vóru fyri ágangi, "handlaðu" í støðuni og forsvaraðu seg móti tí, tær upplivdu sum fysiskan ella sálarligan kynsligan ágang. Fleiri av teimum, sum svaraðu, siga, at tær liggja undir "mytuni" um, at sjúkrasystrar eru fryntligar - og somuleiðis undir hugburðinum um, at tað er í lagi at siga eitt hvørt um teirra ósjónd.

Dømini um, hvat sjúkrasystrar kenna sum seksuellan ágang, snúgva seg um alt frá orðunum "Hej skat", óynskt at vera til undran í sínum arbeiði til óbehagiligar fysiskar nertingar.

Tað eru sjúklingar, avvarðandi hjá sjúklingum, starvsfelagar og leiðarar, sum fremja ágangin móti sjúkrasystrunum, harav sjúklingarnir eru størsti bólkurin.

